# Avtala

**millum Almanna- og mentamálaráðið**
**og**
**Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu og Runavíkar kommunu**
**um at veita fólkabókasavnstænastur til aðrar kommunur**

## 1. Inngangur

1.1. Sambært § 10 í løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn, hereftir nevnd bókasavnslógin, hevur landsstýrismaðurin heimild at lata stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum. Stuðulin er ætlaður at menna bókasavnstænastur í kommununum, sum ikki hava fólkabókasøvn og til at menna nýggjar tænastur hjá verandi fólkabókasøvnum.

1.2. Fólkabókasøvn eru kommunalir stovnar, og allar kommunur hava skyldu til at veita fólkabókasavnstænastu sambært § 7, stk. 1, bókasavnslógini. Kommunur, ið ikki hava egið fólkabókasavn, ella hava eitt fólkabókasavn, har einki starvsfólk hevur hægri bókasavnsfakliga útbúgving ella bókavarðaútbúgving, skulu sambært § 7, stk. 3, í bókasavnslógini gera avtalu við aðra kommunu um at veita fólkabókasavnstænastu.

1.3. Í Føroyum eru 29 kommunur, men einans tríggjar kommunur hava í dag fólkabókasavn við starvsfólki, ið hava hægri bókasavnsfakliga útbúgving. Hesar eru Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna.

1.4. Við hesi avtalu og við heimild í bókasavnslógini § 10, hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum tikið avgerð um at lata teimum trimum fólkabókasøvnunum stuðul at býta sínámillum. Hesar tríggjar kommunurnar skulu síðani gera avtalu við hinar 26 kommunurnar um at veita teimum fólkabókasavnstænastu sambært § 7, stk. 3, í bókasavnslógini.

## 2. Um avtaluna

2.1. Partarnir í avtaluni eru:

| | | |
|---|---|---|
| Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum | og | 1. Tórshavnar kommuna<br>2. Klaksvíkar kommuna<br>3. Runavíkar kommuna |

2.2. Við hesi avtalu fáa omanfyrinevndu kommunur stuðul frá landinum sambært pkt. 4, afturfyri at kommunurnar gera avtalu við hinar kommunurnar í landinum um at veita og menna fólkabókasavnstænastu í hesum kommununum. Uppskot til avtalur millum omanfyri nevndu kommunur og hinar kommunurnar er viðfest sum skjal 1.

## 3. Tænastan

3.1. Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna skulu veita bókasavnstænastur til hinar kommunurnar í landinum. Hetta verður gjørt við at gera avtalur við hinar kommunurnar hesum viðvíkjandi.

3.2. Tænasturnar, sum Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna skulu veita hinum kommununum, eru lýstar í bókasavnslógini, kapittul 3, og fevna eitt nú um at veita ráðgeving um bókasavnsrakstur, bókasavnsskipanir, skráseting, innkeyp, kassatión, klassifikatión, leiting, vegleiðing, meting av tilfari og keldum og miðlan av bókmentaligum tilfari.

3.3. Tænasturnar fevna eisini um at stuðla undir, at fólkabókasøvnini, sambært § 5, stk. 1, í bókasavnslógini, fremja upplýsing, lærdóm, talgilda búgving og luttøku í mentanarlívinum og samfelagnum sum heild.

3.4. Tænasturnar kunnu eisini fevna um at læna bøkur og annað tilfar út í eitt avmarkað tíðarskeið ella at skipa fyri tiltøkum.

3.5. Um einki fólkabókasavn er í einari kommunu, skulu ávikavist Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna tryggja, at borgararnir í kommununi, sum avtala er gjørd við, hava atgongd til fólkabókasavnstænastur í ávikavist Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu ella Runavíkar kommunu.

**4. Stuðul**
4.1. Fyri at veita tænastuna sambært pkt. 3 fáa Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna stuðul sambært § 10 í bókasavnslógini. Stuðulin er treytaður av, at Føroya Løgting hevur játtað fígging til endamálið, og at landsstýrisfólkið tekur avgerð um at býta stuðulin til endamálið. Landsstýriskvinnan hevur tikið avgerð um, at kr. 2.010.000 verða lutaðar sundur, soleiðis at Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna fáa ein triðing av upphæddini hvør, tvs. kr. 670.000 í part fyri 2024.

4.2. Stuðulin er treytaður av,
1) at Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna semjast um at býta hinar kommunurnar sínámillum og at veita teimum fólkabókasavnstænastur og
2) at Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna hvør í sínum lagi altíð hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving.

4.3. Í avtalunum millum Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu og Runavíkar kommunu og hinar kommunurnar skal ikki vera nakað gjald fyri tænasturnar, sum verða veittar sambært hesi avtalu.

4.4. Stuðulin sambært hesi avtalu fellur burtur, um kommunan ikki hevur starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella við bókavarðaútbúgving. Í teimum førum, har starvsfólk sigur seg úr starvi, skal kommunan tó hava stundir til at seta nýtt fólk við røttu útbúgvingini í starv, uttan at hetta skal ávirka stuðulin.

**5. Aðrar tænastur**
5.1. Kommunurnar kunnu sínámillum gera avtalur um aðrar bókasavnstænastur, ið ikki eru fevndar av hesi avtalu. Gjald kann tá verða tikið fyri tær serstøku bókasavnstænasturnar.

**6. Gildistíð og uppathald**
6.1. Henda avtala kemur í gildi 30. september 2024, og er galdandi til 31. desember 2024.
6.2. Avtalan verður sjálvvirkandi longd í eitt nýtt 12 mánaða skeið eina ferð um árið, verður avtalan ikki uppsøgd sambært pkt. 6.3.

6.3. Avtalan kann sigast upp við 3 mánaða freist til tann 1. januar, sí tó pkt. 7.

6.4. Avtalan og stuðulin eru treytað av, at Føroya Løgting játtar pening til stuðulin.

6.5. Fær ein kommuna, sum ikki er partur í hesi avtalu, í framtíðini egið fólkabókasavn við starvsfólki við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving, kann avtalan endurskoðast við tí fyri eyga, at kommunan gerst partur av hesi avtalu. Í slíkum førum verður hetta gjørt við virknaði frá 1. januar í árinum eftir, at treytirnar omanfyri eru loknar.

**7. Mishald**
7.1. Í sambandi við týðandi mishald kann avtalan verða sett úr gildi sambært vanligu føroysku reglunum um hetta.

7.2. Avtalan kann tó einans verða sett úr gildi, um mishaldið ikki er steðgað innan 30 dagar eftir, at tann ikki-mishaldandi parturin hevur sent tí mishaldandi partinum skrivliga áheitan um at steðga mishaldinum. Áheitanin skal tilskila mishaldsorsøkina og gera greitt, at avtalan verður sett úr gildi, um mishaldið ikki er steðgað innan freistina.

**8. Lógarval og varnarting**
8.1. Avtalan er undirløgd føroyskan rætt.

8.2. Stinga ósemjur seg upp viðvíkjandi avtaluni ella teimum tænastum, sum avtalan fevnir um, skulu partarnir fyrst og fremst royna at loysa ósemjurnar við sínámillum semjusøkjandi samráðingum.

8.3. Eru partarnir ikki eru vorðnir samdir innan 45 dagar, verða ósemjurnar at leggja fyri Føroya Rætt.

**9. Undirskrift**
9.1. Avtalan skal undirskrivast í fýra eintøkum, eitt til hvønn partin.

| Tórshavnar kommuna | Klaksvíkar kommuna | Runavíkar kommuna |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Karl H. Johansen | Torbjørn Jacobsen |
| Borgarstjóri | Borgarstjóri | Borgarstjóri |

Almanna- og mentamálaráðið, 26. september 2024

Sirið Stenberg
Landsstýriskvinna